Búskapur og vinna:

## Eingin toskur

Toskastovnurin í Kattegat og Skagerak er so illa fyri, at svenskir fiskifrøðingar mæla til at steðga fiskiskapinum. Svensku fiskifrøðingarnir siga, at nú er so lítið eftir av stovninum, at skal tað bera til at bjarga honum, má fiskiskapurin steðga.

Hagtølini vísa, at í fjør vórðu fiskað bara 10 prosent av tí, sum fiskað varð í 1980. Samstundis vísa tølini, at svensku fiskimenninir kláraðu ikki at fiska meiri enn helmingin av sínari toskakvotu í Kattegat og Skagerak í fjør.

## Umvælast í Danmark

Danska ferjan "Princess of Scandinavia" kom annan hvítusunnudag til Fredericia, har skipasmiðjan skal umvæla skaðan, sum skipið fekk, tá eldur kom í maskinrúmið fríggjakvøldið. Í gjár var ikki greitt, hvussu langa tíð umvælingin fer at taka.

DFDS, sum eigur "Princess of Scandinavia" boðaði mánadagin frá, at rutur felagsins millum Kristiansand og Gøteborg og millum Newcastle og Kristiansand verða niðurlagdar í eina viku. "Princess af Scandinavia" var á veg úr Newcastle til Kristiansand, tá eldur kom í maskinrúmið. 900 ferðafólk vóru við, men eingin skaða av tilburðinum.

## Úr Esbjerg

Síðani tíðliga í apríl hevur Mærsk Olie & Gas ikki nýtt havnina í Esbjerg, tá felagið hevur flutt útgerð til og frá oljupallunum í Norðsjónum. Ístaðin hevur felagið nýtt eina havn í Niðurlondum.

Orsøkin er ein sáttmálatræta við teir, sum arbeiða í oljuhavnini í Esbjerg. Havnini kemur tað illa við. Bara síðani fyrst í apríl hevur havnin mist 30.000 tons av góðsi til ta niðurlendsku havnina.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Eysturtimor fingið fullveldi



*Nógv børn tóku lut í hátíðarhaldinum í høvuðsstaðnum Dili, tá Eysturtimor varð lýst sjálvsstøðugt ríki*

*Mynd: Reuters*

**Á midnátt hvítusunnukvøld varð Eysturtimor lýst sjálvsstøðugt ríki.**

EYSTURTIMOR
*Árni Joensen*

Á midnátt hvítusunnukvøld varð Eysturtimor lýst sjálvstøðugt sum tað 192. limalandið í heimsfelagsskapinum ST. Tað var ST-aðalskrivarin Kofi Annan, sum formliga lýsti landið sjálvsstøðugt og handaði teimum politisku leiðarunum á staðnum ræðið, sum ST hevur umsitið seinastu trý árini.

Í 1999 samtykti fólkið í Eysturtimor, at landið skuldi skipast sum sjálvsstøðugt lýðveldi eftir 450 ár undir portugisiskum hjálandastýri og 24 ár undir indonesiskari herseting. 80 prosent atkvøddu fyri fullveldi.

Í røðu síni sunnukvøldið segði Kofi Annan, at hóast fólkið í Eysturtimor nú sjálvt tekur við valdinum, verður framvegis stórur tørvur á altjóða hjálp, so tað nýggja samfelagið kann fóta sær. Altjóða samfelagið hevur lovað Eysturtimor meiri enn tríggjar milliardir krónur í hjálp tey næstu trý árini, og eftir hátíðarhaldið sunnukvøldið kunngjørdu einstøk lond, at tey fara at veita stuðul.

Fólkið í Eysturtimor er yvirhøvur fátækt, og arbeiðsloysið er heili 70 prosent, men teir nýggju politisku leiðararnir bera ikki ótta fyri framtíðini. Væl av olju og gassi er í landinum, og roknað verður við, at samfelagið fer at fáa ágóðan av náttúruríkidøminum um trý ár. Samstundis ætla leiðararmnir at menna aðrar vinnuvegir so sum fiskivinnuna, landbúnaðin og ferðavinnuna.

Umleið 800.000 fólk búgva í Eysturtimor.

# Blair mælir til betri samband tvørtur um Atlantshavið

**Bretski forsætisráðharrin roynir at slætta sjógv millum Evropa og USA, nú amerikanski forsetin kemur til Evropa í morgin**

BRETLAND
*Árni Joensen*

Í einari samrøðu við blaðið The Times um hvítusunnuna royndi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, at sissa teir evropeisku politikararnar, sum í seinastuni hava funnist at amerikanska politikkinum í sambandi við bardagan ímóti altjóða yvirgangi. Men teir amerikansku politikararnir fingu eisini sítt.

Í samrøðuni duldi Blair ikki fyri, at hann tekur undir við politikkinum hjá amerikansku stjórnini, og tað var týðiligt, at hann heldur tað vera umráðandi, at politikarar báðumegin Atlantshavið styðja hvør annan í málinum um altjóða yvirgang.

Eygleiðarar í London siga, at orðini hjá forsætisráðharranum eru ein roynd at slætta sjógvin, nú George W. Bush, forseti kemur til Evropa í morgin. Teir næstu seks dagarnar skal Bush vitja í Berlin, Moskva, París og Rom. Týsku myndugleikarnir vænta, at fleiri túsund fólk fara atganga mótmælisgongu í Berlin, har tey fara at mótmæla amerikanska politikkinum í Miðeystri, hóttanini um at leypa á Irak og umhvørvispolitikkinum hjá Bush-stjórnini.

Politiskir eygleiðarar í London siga, at Evropaferðin hjá amerikanska forsetanum verður uttan iva trupul, og at hann kann vænta sær atfinningar á fleiri økjum.

Úr Norðurlondum:

## Fingu høvd í trolið

Skotski trolarin "Bonaventure" fekk um vikuskiftið eitt mannahøvd í trolið, meðan teir royndu góðar 80 fjórðingar eystur úr bretsku strondini.

Trolarin fór inn til Eyemouth í Skotlandi, har tann heldur óhugnaligi fongurin varð latin myndugleikunum.

Skotsku myndugleikarnir siga, at trolarin royndi á einari leið, har skipaferðslan er stór. M. a. sigla ferðamannaog farmaskip hendanvegin, tá tey sigla millum Danmark og Bretland, siga skotsku myndugleikarnir. Skotska løgreglan sigur seg ikki hava upplýsingar um nakran, sum er horvin á leiðini, har trolarin royndi.

## Spara nógv

Nógvir danir leggja stóran dent á at spara upp til pensjónstíðina. Seinastu árini hevur áhugin verið heldur minni enn fyrr, men kortini er so nógv í pensjónsgrunnunum nú sum ongantíð fyrr.

Ein uppgerð hjá danska toll- og skattaverkinum vísir, at um ársskiftið áttu danir 62 mia. krónur standandi í teimum ymsu pensjónsgrunnunum. Tað var 4,5 mia. krónur meiri enn eitt ár frammanundan. Kanningar hjá toll- og skattaverkinum vísa, at fólk halda fram við at spara upp, hóast teir politisku myndugleikarnir av og á fremja búskapartiltøk, sum avmarka møguleikarnar at spara.

## Styrkja ikki kongshúsið

Flestu norðmenn halda, at tey bæði systkinini, Haakon krúnprinsur og Marta Louisa prinsessa, kundu havt verið hepnari, tá tey valdu sær maka. Mette Marit krúnprinsessa og Ari Ben, sum er trúlovaður Martu Louisu, hava sambært flestu norðmonnum gjørt norska kongshúsið veikari.



# Vóru heiðrað fyri teirra brøgd



*Tey trí, Elsuba á Høvdanum, Bjarni Poulsen og Erland Sivertsen fingu handað heiðursnálir og heiðursbræv, frá Hans Eiler Hammer, sóknarpresti.*

**Leygardagin varð skipað fyri hátíðarhaldi í Christianskirkjuni í Klaksvík, har tríggir norðoyingar fingu handað heiðursbrøv- og nálir fyri avrik teirra, tá tey við egnum lívi í vága lupu á bláman fyri at hjálpa øðrum**

HÁTÍÐARHALD
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Hetta var fyrsta hátíðarhald av sínum slag í Klaksvík, og okkurt um eini sjeyti fólk vóru savnað í Christianskirkjuni leygardagin.

Hetjurnar hendan dagin vóru Elsuba á Høvdanum, Bjarni Poulsen og Erland Sivertsen. Orsøkin til hetta var, at tey hvør á sín serstaka hátt kunnu fegnast um, at tey hava bjargað einum menniskjalívi.

Bragdið hjá Elsubu á Høvdanum fór fram í juni 1961, tá hon bjargaði Ann Petersen, ið var dottin á sjógv. Ann var einans 6 ára gomul, tá hendingin fór fram, men hóast nógv ár eru liðin, so hevur hon ikki gloymt Elsubu.

Ann Petersen hevði sjálv innstillað Elsubu á Høvdanum til heiðursnálina, ið GullHornið í Havn hevur latið úr hondum.

Hinar hetjurnar vóru Bjarni Poulsen og Erland Sivertsen, sum vóru við til at bjarga lívinum hjá Mathiasi Samuelsen.

Táverandi 11 ára gamli Mathias var í oktober í 1999 komin til Føroya í vetrarfrítíð. Saman við tveimum vinmonnum hansara spældi hann sær í fjøruni á Viðareiði. Veðrið var ikki av tí besta, og brádliga tók eitt brot tveir av dreingjunum við sær út á bláman.

Drongurin, ið stóð einsamallur eftir á turrum, gjørdi skjótt av og leyp niðan í bygdina eftir hjálp.

Tann eini drongurin megnaði eftir stuttari løtu sjálvur at koma upp aftur á turt, meðan Mathias varð slongdur so mikið langt út, at hann ongan møguleika hevði fyri sjálvur at sleppa á land aftur.

Erland Sivertsen, drongurin, ið fór eftir hjálp, hitti beinanvegin nakrar menn og segði teimum so, hvat hent var.

Millum hesar menn var Bjarni Poulsen, og komnir oman í fjøruna, bant hann eina línu um miðjuna á sær, bað hinar menninar halda fast, og leyp síðan á sjógv eftir Mathiasi.

Hóast rok og nógv brim var í sjónum, so megnaði Bjarni at finna Mathias, og hjálpa honum á land.

Hesar óhugnaligu hendingar, sum tó endaðu í øllum góðum, vóru orsøk til hátíðarhaldið í Christianskirkjuni. Tey hittust fyrst við Róðrarneystið, har myndir vórðu tiknar við vágni, sum bakgrund. Síðani varð farið niðani í kirkjukjallaran, har sjálv handanin skuldi fara fram. Hans Eiler Hammer, sóknarprestur, handaði hesum trimum fólkunum heiðursnálir og heiðursbræv fyri teirra megnar avrik.

Hans Eiler greiðir frá, at løtan í kirkjukjallarinum var stak hugnalig.

Sjálvur segði hann nøkur orð, og síðan var boðið til drekkamunn.



*Ann Petersen (t.v.) og Mathiasi Samuelsen (t.h. húkandi), kundu sanniliga gleðast saman við sínum persónligu hetjum.*

Klaksvíkar Róðrarfelag:

# Stuðulsróður um vikuskiftið

**Um vikuskiftið skipaði Klaksvíkar Róðrarfelag fyri stuðulsróðri á vágni í Klaksvík. Hetta varð gjørt til frama fyri teir nýggju bátarnar**

KAPPRÓÐUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Róð var í millum málið á Grønabóli og málið inni í Klaksvík, sum er á Stongunum. Hetta er túsund metra teinurin, sum róð verður kapp á Norðoyastevnu

Sosialurin fræcredtir, at bátarnir róðu knappar hundrað túsund metrar tilsamans.

Og má tað sigast at vera sera gott, siga tey úr Klaksvíkar Róðrarfelag, sum hevur fimm manningar tilmeldaðar til Føroyameistarakappingina í ár.

Tað vóru kortini sjey manningar, sum tóku lut í stuðulsróðrinum, tí har eru tvær so kallaðar »old girls« manningar, sum hava róð nú í einar tveir mánaðir.

Hvør rógvari hevur skaffað okkurt um tíggju stuðlar. Stuðlað verður við oyrum fyri meturin, og tað er ójavnt, sum fólk stuðla. Eisini eru onkrar fyritøkur, sum stuðla.

Limir úr Klaksvíkar Róðrarfelag lata væl undirtøkuni.

– Norðoyingar og fyritøkur eins væl og vinnulívið her norðuri hava stuðlað felagnum ótrúliga væl, sigur Kristian Eli Zachariassen, formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag. Hann er skjótur at leggja afturat, at her sipar hann ikki bert til stuðulsróðurin, sum júst hevur verið, men yvirhøvur.

– Vit eru sera fegin um allan stuðulin vit hava fingið, nú vit hava gjørt so umfatandi íløgur tey seinastu árini, sigur hann.

Klaksvíkar Róðrarfelag er nú farið í gongd við fyrireikingarnar til kappróðurin á Norðoyastevnu, sum í ár verður vikuskiftið 1. og 2. juni.



*Bátarnir hjá Klaksvíkar Róðrarfelag róðu knappar 100.000 metrar tilsamans, so ikki kann sigast annað enn, at stuðulsróðurin eyðnaðist væl.*